








# *Professionell ferðaskrivstova*



Greengate Incoming er ein ferðaskrivstova, sum á ein professionellan hátt selur og marknaðarførur Føroyar sum ferðavinnutjóð, eins og at skipa fyri útferðum og at leggja til rættis ráðstevnur, fundir o.l. fyri virkir og einstaklingar.

Endamálið við Greengate Incoming, sum varð stovnað í 2001, varð at bjóða ferðir til Føroyar og serlig útvald ferðamál uttanlands.

Hesi árini síðan 2001 er ein støðug menning farin fram av produktum, sum fyritøkan á hvørjum ári bjóðar kundum sínum. Fyritøkan hevur í dag eitt umfatandi úrval av spennandi og væl tilpassaðum tilboðum til útlendsku ferðafólkini.

Greengate leggur stóran dent á at hava góð sølutól sum t.d. vælvirkandi og dagførda heimasíðu eins og eitt spennandi katalog, sum hvørt ár verður framleitt og givið út á teimum marknaðum, sum fyritøkan hevur samband við.

Greengate Incoming bjóðar nógvar ymiskar upplivingar bæði innan- og uttanlands.